

*Størra myndin er tikin á Sandoyarbankanum, tá vit høvdu ruskut veður, og seinna myndin er tikin, tá vit í góðveðri sigldu inn í Yell-sundið í Hetlandi*
*Myndir: Vilmund Jacobsen*

# At sigla – tað er at liva

**Summar er í hondum, og frítíðarbátar eru riggaðir til sigling millum oyggjar og lond. Fyrsta bátastevnan hevur verið, og hin næsta – og størsta – verður í Vestmanna í morgin. At sigla er eitt frítíðarítriv, tú skjótt kanst gerast bitin av**

**UMBORÐ**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hjá henni ella honum, sum dáma at vera á báti, er lítið meira avstressandi enn tað. Hetta geldir ikki bara frítíðarsigling, men so sanniliga eisini ein snøristúr, ein reyðfiskatúr eitt góðveðurskvøld ella ein túr við runddorgini.

Fríska luftin, hugnin, friðurin og spenningurin, tá motorurin er sløktur, og tú liggur á einum reyðfiskamiði tætt undir landi.

Rekur tú framvið einum sandeyga á grunna vatninum, og sjógvurin blikar, sært tú reyðfiskin snodda til øgnini undir teininum.

Knappliga er fast, og er slagið gott, kann tað hesa fyrstu løtuna kennast sum í botni.

Kanska eru tveir sprellivandi fiskar á fyrsta drátti…

…

Nú skuldi hendan greinin ikki røða um tað at fiska, tí tá er skjótt, at tankarnir fara á flog, og tú ikki fært afturhald.

Hetta er tíðin, tá flestu, sum eiga frítíðarbát, eru liðug at gera bátin kláran og so smátt eru byrjað at sigla kring oyggjarnar. Onkur er eisini farin at spæla sær við tankan um at sigla millum lond.

Fyrsta bátastevnan hevur verið, og hon eydnaðist rættiliga væl, tá ivasama veðrið seinasta leygardag verður havt í huga.

Í morgin verður so ársins bátastevna, sum er stevnan, ið vestmenningar so hegnisliga skipa fyri – áttanda árið á rað.

Bátastevnan í Vestmanna er hin størsta av sínum slag og í fjør, tá veðrið vignaðist so avbera væl, luttóku fleiri enn 200 bátar úr øllum landinum.

At sigla er av sonnum eitt frítíðarítriv, tú skjótt kanst gerast bitin av.

Sjálvur havi eg ongantíð átt frítíðarbát, men eigi í staðin nógvar túrar við snøri og nógvar túrar á fuglaveiði. Fyribils er tað at eiga ein hóskiligan frítíðarbát bara ein dreymur…

Á sumri í 2005 eydnaðist mær kortini at sleppa ein túr til Hetlands og heimaftur sum sjálvur triði við einum 30 fót stórum glastrevjabáti.

Hetta var eitt stórt upplivilsi, og á ferðini fekst tú eisini at kenna, at ein slíkur opin glastrevjabátur er ikki stórur á opnum havi millum lond.

Vit høvdu 24 tímar úr Føroyum og undir land í Hetlandi, og á heimferðini var siglingstíðin á leið hin sama.

Einir 5-6 bátar vóru í fylgi á hesari ferð, báðar vegir. Hin størsti var Pegasus, og hin minsti var eitt 8-mannafar, bygt í Kaldbak.

Vit loystu í Havn nakað fyri klokkan 18, og tá leið móti midnátt, og vit vóru staddir á Sandoyarbankanum, høvdu vit frískan vind aftan tvørs, sum teir rópa tað.

Eisini hetta var eitt upplivilsi.

Í náttarmyrkrinum noyddist tú at stýra undan aldunum, sum tóku seg upp og høvdu hug at bróta. Onkur lítil skvampur snýkti seg upp ímillum presendingina og bátssíðuna og bloytti turra bógvin, sum lá á borðinum.

Veðrið gjørdist ongantíð ófantaligt, men høvdu vit havt ættina ímóti – í staðin fyri aftan tvørs – hevði náttin ivaleyst verið strævin.

…

Einsamallur var eg uppi og stýrdi bátinum hesa náttina, meðan hinir báðir, sum høvdu skiftst um róðrið fyrr um kvøldið, fingu sær ein blund.

Náttin leið, og tíðliga byrjaði at lýsa.

So hvørt, sum morgunin dagaði fram, minkaði lotið, og tá tað lýsti, høvdu vit fínasta veður heilt til lands.

Fyrstu dagarnar í Hetlandi høvdu vit fínasta veður og brennandi sól. Teir seinnu dagarnar var veðrið skiftandi, og á ferðini heimaftur til Føroya var fyrsti helmingur eitt sindur strævin, men seinastu fjórðingarnar høvdu vit aftur góðveður.

Hetta var ein góður og ógloymandi túrur, sum eg væl kundi hugsað mær at gjørt einaferð aftrat.